HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagur, 18. apríl 2023 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Kristianna W. Poulsen, Leivur Simonsen, Jens á Skipagøtu og Malan á Dul Nielsen

Avboð: Gunvør Balle

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Malan á Dul Nielsen

Skrá:

1. **Endurgeving av fundinum við foreldraumboðini:**
   Nordplus – tað er strævið at vera vertur, men tað er gevandi.
   Onnur trivnaðartiltøk: Sova í skúlanum, garðdag v.m.
   Evnisvikur: Hon hevur akkurát verið, og evnisvikan er hvørt ár.
   Hjálpartiltøk sum t.d. tað sum var í fjør ella okkurt um jólini til sum t.d. "í menniskjum góður tokki," ella okkurt, sum onkur annar hjálparfelagsskapur skipar fyri. So kann mann sum skúli ella flokkur gera okkurt fyri at samla pening inn.
   Okkurt traditionelt tiltak kundi komið afturat tunnusláttri og fletting osv. T.d. er ein garðdagur nakað, sum foreldrini sakna. Hjálpandi hondin var eitt gott átak.
   Mann kann eisini skipa fyri tiltaki í skúlanum, sum skúlin ikki beinleiðis skipar fyri, men bara er karmur um.

2. **Fundurin við skúlastýrið við Løgmannabreyt**
   - Hvat kunnu vit gera harfrá: Tað bleiv tosað um samstarv um valfakini. T.d. motorlæra, ber til at samstarva um tað, hóast mann ikki er samdur um fótbóltsbreyt/hondbóltsbreyt? Hetta kemur neyvan í lag í ár.
   - Forskúli var eisini eitt, sum var uppi at venda, men hvørgin av skúlunum setur seg føran fyri tí sum er vegna plásstrot.
   - Skulu vit arbeiða víðari við nøkrum, sum kom upp á fundinum?

- Tað er upplagt at vera felags um foreldratiltøkini.
- Vit ætla at hava ein árligan felags fund við skúlastýrið í SVL

3. Fótbóltsvøllurin í skúlagarðinum

Hoyvíkar skúli hevur fingið svar upp á spurningin um, hvør hevur ábyrgdina av fótbóltsvøllinum. Hetta er tí, at ein pápi hevur gjørt vart við, hvussu ringur standurin er. Tað er Mentamáladeildin, sum hevur ábyrgdina, og vit senda ein teldupost til teirra og siga teimum, hvussu ringur standurin er.

Niðurstøðan er, at vøllurin er vandamikil.

Húsavørðurin burdi havt ábyrgdina av at finna útav, hvat skal gerast nær, men skipanin fungerar ikki.

4. Svar frá kommununi

Vit sakna enn nøktandi svar frá kommununi um ferðsluviðurskiftini rundan um skúlan**,** og tí ætla vit aftur at senda spurningarnar oman. Tað er serliga av og á skipanin við kirkjuna, sum ikki er nøktandi.

5. At skipa fund við næmingaráðið

Vit eru enn í einari uppbyggingarfasu, har vit royna at gera greitt, hvør uppgávan hjá næmingaráðnum er: Tey hava havt tríggjar fundir, og nú byrja tey at skilja, hvør uppgávan hjá teimum er.

Næmingaráðið vil fegin møta skúlastýrinum, og vit hava avtalað, at næmingaráðið og skúlastýrið møtist 11. mai kl. 11:30

6. Ymiskt

Tórshavnar Kommuna hevur kunnað um, at freistin um uppskot til býartorgið er útsett vegna aðra verkætlan, sum kommunan eisini skipar fyri.

Skal mann eventuelt hava ein garðdag næsta vár?

Avtalað er, at skúlastýrið møtist aftur 11. mai

Fundurin lokin kl. 18:00